# Tórbjørn spyr um pengar

**Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, vil hava at vita, hvar peningurin, sum varð játtaður til tvey vegastrekki í Eysturoynni, er blivin av**

IVAMÁL
*Henny Olsen*

Bjarni Djurholm, landstýrismaður í vinnumálum, fær nú ein fyrispurning frá Tórbirni Jacobsen, løgtingsmanni.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at hann og onnur fingu við stórum stríði játtað pening av løgtingsins fíggjarlóg til vegábøting í Eysturoynni, men nú situr Tórbjørn og klórar sær í nakkanum, tí hann veit ikki, hvat peningurin bleiv av.

2 milliónir krónur vórðu játtaðar til vegastrekkið Oyri– Norðskáli, men ikki ein tann einasta króna er nýtt har, tó at tað er gott 10 mánaðir síðani, at fíggjarlógin varð samtykt. Tórbjørn vil nú fegin frætta, nær arbeiðið byrjar.

6 milliónir krónur vórðu játtaðar til vegastrekkið Skálabotnur– Strendur. Her er ímillum lítið og einki komið burturúr, sigur hann. Hetta arbeiðið er tó, í mun til hitt, byrjað, men nær tað er liðugt, stendur enn rættiliga óklárt. Vegurin stendur í løtuni blokeraður og eingi amboð sigast at vera á økinum. Tórbjørn Jacobsen vil fegin vita, hvussu nógv av játtanini higartil er nýtt, og nær landstýrismaðurin fer at taka arbeiðið uppaftur.

Tórbjørn tekur til orða, at hetta uttan iva er eitt tað mest átrokandi vegastrekkið at fáa framt í øllum landinum og kundi tí hugsa sær at fingið upplýst, hvørjar ætlanir landstýrismaðurin sum heild hevur um hetta vegastrekkið.

Eisini varð 1 millión játtað til nýggja rundkoyring á Skipaneskrossinum. Hetta arbeiðið er, til gleði fyri Tórbjørn og flest onnur, byrjað og verður liðugt um ikki so langa tíð.



*Tórbjørn Jacobsen setir nú Bjarna Djurholm fyrispurning um játtanir til vegarbeiði í Eysturoynni*

# Íslendsk list til Føroya

**Anna Thóra Karlsdóttir og Guðrun Gunnarsdóttir fara í næstum at sýna fram list teirra í Norðurlandahúsinum.**

LIST
*Henny Olsen*

Leygardagin 6 september kl.14 letur upp ein forvitnislig framsýning í Norðurlandahúsinum. Talan er um tær báðar Anna Thóra Karlsdóttir og Guðrun Gunnarsdóttir, ið saman nevna seg Tó-Tó.

Henda framsýning hevur fingið heitið ”Samstarvsleikur,” vegna teirra íblástur og grundstøði, sum liggur í samstarvinum.

Hesar listarkvinnur koma at sýna fram list innan tøving, har tær millum annað gera brúkslist, teppir, sjalir og smærri skulpturar.

Anna Thóra kemur eina mest at vísa fram skulpturar úr tøvdari ull, meðan Guðrun fer at vísa ymiskt skulpturelt úr tilfarið av ymsum slag.

Anna Thóra og Guðrun hava havt framsýningar í heimlandið teirra, umframt úti í verð. Tær hava verið so langt sum í Kanada og Japan við list teirra.

Tær arbeiða eisini í felagsskapi við øðrum listarkvinnum, og eiga tær í dag gallaríið “Kirsjuberjatré” á Vesturgøtu 4 í Reykjavík.

Í sambandi við framsýningina halda tær báðar listarkvinnurnar fyrilestur við myndum í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum frággjadagin kl.16.





*Anna Thóra Karlsdóttir og Guðrun Gunnarsdóttir hava framsýning í Norðurlandahúsinum frá leygardegnum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Skeið í psykiatri

SKEIÐ
*Henny Olsen*

Í døgunum 24. november til 28. november verður eitt skeið hildið innan psykiatri. Tað er “Uddannelsesafdelingen, Psykiatrien i Århus Amt” í samstarvi við Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, ið skipar fyri.

Skeiðið er ein partur av einari longri eftirútbúgving innan psykiatriska økið, sum byrjar fyrst í 2004 og sum verður lýst nærri seinni.

Hetta skeiðið vendir sær til røktarar, sosial- og heilsustøðingar, pedagogar, sjúkrarøktafrøðingar, ergo- og fysioterapeutar, sosialráðgevar og onnur, ið arbeiða ella koma at arbeiða innan psykiatriska øki og heimarøktina.

Endamálið við skeiðnum er at geva luttakarunum størri vitan um psykoatriska órógv, so tey verða betur før fyri at fáa eyga á sálarsjúkueyðkenni og at skilja sjúklingin.

Nærri upplýsingar og tilmeldingarblað, umframt meir vitan um eftirútbúgvingina fáast við at venda sær til Psykiatriska depilin við Landssjúkrahúsið í Tórshavn til Inger M. Gabrielsen á tlf. 313540 lok. 323 ella senda eitt teldubræv til inmaga@lsh.fo

Tilmeldingarfreistin er 1. oktober 2003.

## Familjudagur í Hoydølum

**Í sambandi við námsferð skipar 02b í Hoydølum fyri familjudegi í Hoydølum.**

NÁMSFERÐ
*Henny Olsen*

Tann 28. mars næsta ár, man verða ein stórur dagur fyri 02b í Hoydølum. Hetta er nevniliga dagur, har tey fara eina námsferð til “steikipannuna í Andalusia” Sevilla í Spania. Til eina slíka ferð krevst nógvur peningur, og hava tey eisini savnað heilt fitt. Tey hava eitt nú selt skava og vinn- seðlar, verið garderobuvørðar á veitslum og eisini eru tey sloppin at selja pylsur, hotdogs, kaffi og góðgæti á Tórsvølli, tá dystur hevur verið.

Í sambandi vð ferðini fer 02b at skipa fyri stórum familjudegi í samkomuhøllini í Hoydølum. Hesin dagur verður leygardagin tann 6. september og verður frá klokkan 11 til klokkan 18. Á hesum degi verður skipað fyri nógvum tiltøkum so sum køkutombola, fiskibrunnur, café, loppumarknaður, bóltkast, sumo-glíming og hoppiborg.

Enn er eitt fitt petti eftir á mál, til ferðakassin er fløddur undir lúkuna. Tí vónar 02b í Hoydølum, at øll, familja, skyldfólk, vinir, kenningar, lærarar og næmingar møta fjølment og væl upp í samkomuhøllini leygardagin 6. september kl. 11.




